# Bygdarráðsfundur

# Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 18.10.2021 kl. 17.30

Á fundi: Janus Thomsen
Ronni Hammer
Eir J. Norðberg
Gunnhild Mortensen
Niels Olaf Eyvindsson
Thorstein Thomsen
Martin í Nesi

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

Formaðurin bað um loyvi at taka eitt mál við aftrat, hetta varð játtað – á skrá sum mál nr. 1.

1. **Grótkastið – grót úr Noregi.**
   Skriv frá LBF Jan Odmarsson viðvíkjandi 2 lastum av gróti úr Noregi. Kostnaðurin er kr. 1.862.000,- x 2 ella kr. 3.724.000,00. Á fundi tann 01.09.2021 varð samtykt at játta kr. 3.318.258,00 til grót úr Noregi.
   **Avgerð**:
   Einmælt samtykt at játta meirkostnaðinum av gróti á góðar kr. 400.000,00.

2. **Skriv / umsókn frá Barnabata viðvíkjandi mentorskipan í Suðuroynni.**
   Barnabati arbeiðir við at fáa eina mentorskipan upp at koyra runt landið, í fyrsta umfari í Suðuroynni, umframt Tórshavn.
   **Trivnaðarnevndin 12.10.2021:**
   Nevndin hevur viðgjørt skrivið og mælir til, at bygdarráðið tekur støðu til málið á komandi fundi.
   **Fíggjarnevndin 18.10.2021:**
   Samtykt varð einmælt at mæla til at taka undir við hesum, treytað av, at allar kommunurnar í Suðuroynni eru við í hesum.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt.

3. **Umsókn um fíggjarligan stuðul frá Parkinsonfelagnum.**
   Søkt verður um stuðul til at betra um viðurskiftini hjá sjúklingum og avvarðandi og at veita upplýsing um sjúkuna.
   **Fíggjarnevndin 18.10.2021:**
   Samtykt varð einmælt at mæla til at stuðla við kr. 2.000,00.

**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

4. **Umsókn um fíggjarligan stuðul til rørslutilboð frá Krabbameinsfelagnum.**
Søkt verður um stuðul til rørslutilboð til krabbameinssjúklingar og teirra familjur í Suðuroynni.
**Fíggjarnevndin 18.10.2021:**
Einmælt samtykt at mæla til at stuðla við kr. 2.500,00.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

5. **Umsókn um fíggjarligan stuðul frá Tónavatn.**
Søkt verður um stuðul til flutning av bátum til og frá Heygsvatni í sambandi við Tónavatn.
**Fíggjarnevndin 18.10.2021:**
Samtykt varð einmælt at mæla til ikki at stuðla hesum, grundað á tann stuðul, sum kommunan longu hevur veitt tiltakinum.
**Avgerð:**
Samtykt við 6 atkvøðum fyri at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

6. **Umsókn um stuðul – landsinnsavning hjá KRIS og Sinnisbata.**
Skipað verður fyri stórum innsavningartiltaki í KVF tann 30. oktober til frama fyri KRIS og Sinnisbata.
**Fíggjarnevndin 18.10.2021:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at stuðla við kr. 5.000,00.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

7. **Gøtuljós oman á Hamranes.**
Kommunan eigur nakrar el-steyrar á goymslu.
**Vega- og havnanevndin 12.10.2021:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at seta 4 gøtuljós upp oman á Hamranes.
**Fíggjarnevndin 18.10.2021:**
Nevndin mælir til, at 4-5 gøtuljós verða sett upp framvið vegnum oman á Hamranes.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

8. **Tilboð frá S.J.H. Commercial Divers uppá land-, botnfesti og sabbar.**
Tilboð 1 - Keta vestur á Bíargarð.

| | |
|---|---|
| Tilfar: | kr. 350.000,00 u/MVG |
| Arbeiðsløn: | kr. 248.000,00 u/MVG |

Tilboð 2 – Kongar í helluna undir brúgvunum.

| | |
|---|---|
| Tilfar: | kr. 111.200,00 u/MVG |
| Arbeiðsløn: | kr. 125.000,00 u/MVG |
| Jekta sand (møguliga) | kr. 28.000,00 u/MVG |

Tilboð sabbar til bátabrúgvarnar.

| | |
|---|---|
| 2 stk. sabbar á hvørja brúgv: | kr. 16.000,00 u/MVG |

**Vega- og havnanevndin 12.10.2021:**
Nevndin mælir til at taka av tilboði nr. 2 kr. 236.200,00 u/MVG + jekta sand kr. 28.000,00 u/MVG. Mælt verður eisini til at taka av tilboðnum uppá sabbar kr. 16.000,00 u/MVG.
**Fíggjarnevndin 30.09.2021:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av tí lægra tilboðnum nr. 2 kr. 236.200 u/MVG + sabbar kr. 16.000,00, íalt kr. 252.200,00 u/MVG og um neyðugt jekta sand burtur kr. 28.000,00 u/MVG.
**Avgerð:**
Samtykt við 6 atkvøðum fyri at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

9. **Tilboð frá S.J.H. Commercial Divers uppá árligt eftirlit av bátabrúgvum.**
Tilboð uppá S.J.H. Commercial Divers uppá tvey árlig eftirlit av bátabrúgvunum – kostnaður kr. 32.000,00 árliga u/MVG.
**Vega- og havnanevndin 12.10.2021:**
Nevndin mælir til at taka av tilboðnum kr. 32.000,00 u/MVG.
**Fíggjarnevndin 18.10.2021:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av hesum tilboði í eitt 5 ára tíðarskeið.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

10. **Innkomin uppskot um navn til nýggja bátahylin.**
Skriv við uppskotum um navn til nýggja bátahylin:
Mitthylur
Miðhylur
Miðhav
Miðhavið
**Vega- og havnanevndin 12.10.2021:**
Nevndin mælir til, at bygdarráðið tekur støðu til innkomnu uppskotini.
**Avgerð:**
Eftir uppskoti frá Niels Olaf Eyvindsson varð atkvøtt um navnið Miðhylur. Eir J. Norðberg og Niels Olaf Eyvindsson atkvøddu fyri hesum og er sostatt fallið.
Síðani varð atkvøtt um ikki at taka av nøkrum av hesum uppskotum. Janus Thomsen, Martin í Nesi, Thorstein Thomsen, Gunnhild Mortensen og Ronni Hammer atkvøddu fyri hesum og er sostatt samtykt.

11. **Vetrarhald – avtala við Landsverk.**

Avtala við Landsverk um vetrarhald av umleið 750 m av kommunalum vegum – kostnaður íalt kr. 22.500,00 uttan MVG.

**Vega- og havnanevndin 12.10.2021:**

Nevndin mælir til at hava somu loysn til vetrarhald í sóknini sum seinasta vetur, har kommunan fær ein veitara at salta vegirnar.

**Fíggjarnevndin 18.10.2021:**

Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av hesari avtalu eins og undanfarin ár.

**Avgerð:**

Einmælt samtykt av fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

Janus Thomsen luttók ikki í viðgerðini av máli nr. 12

12. **Umsókn um byggiloyvi til seyðahús á matr. nr. 527, Hvalba.**

Søkt verður um byggiloyvi til seyðahús í hagapartinum Prestfjall, heimari partur á matr. nr. 527, Hvalba.

**Tekniska nevnd 13.10.2021:**

Nevndin mælir til at geva byggiloyvi, um øll onnur loyvi eru uppá pláss.

**Avgerð:**

Einmælt samtykt at geva byggiloyvi til seyðahús á matr. nr. 527 sambært umsókn, givnum upp-lýsingum, tekningum og loyvum frá avvarðandi myndugleikum, treytað av, at byggingin verður framd í fullum samsvari við hjálagda byggiloyvi frá byggimálsviðgeranum.

13. **Bingjuplássið í Hvalba.**

Tekniska nevnd ynskir broytingar á bingjuplássinum í Hvalba við m.a. fleiri bingjum.

**Tekniska nevnd 13.10.2021:**

Nevndin mælir til at seta pening av til hetta arbeiði og fáa tað avgreitt sum skjótast.

**Avgerð:**

Samtykt varð einmælt at beina málið aftur í Teknisku nevnd.

14. **Uppskot frá Trivnaðarnevndini um arbeiðsbólk.**

**Trivnaðarnevndin 12.10.2021:**

Trivnaðarnevndin mælir til at seta ein arbeiðsbólk við fimm fólkum at arbeiða við einari loysn at vetrarfriða Hvalbiar sókn.

**Fíggjarnevndin 18.10.2021:**

Nevndin mælir til at útseta málið til komandi fund.

**Avgerð:**

Samtykt við fimm atkvøðum fyri at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

15. **Umsókn um marknaumskipan matr. nr. 456a og 456b til ummælis.**

Søkt verður um, at matr. nr. 456a letur umleið 338 m2 til matr. nr. 456b.

<u>**Avgerð**</u>**:**
Samtykt varð við 6 atkvøðum fyri at viðmæla umsóknini um marknaumskipan, at geva frávik í mun til byggisamtyktina og at garðurin verður skrásettur sum mark. Byggisamtyktin verður broytt samsvarandi hesum.

**16. <u>Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 415b til ummælis</u>.**
Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 415b, Sandvík.
<u>**Avgerð**</u>**:**
Samtykt varð einmælt at útseta málið til komandi fund.

**17. <u>Fíggjarætlan 2022 – 1. viðgerð</u>.**
Rakstrarútreiðslurnar eru mettar til kr. 32.263.000,00, íroknað útreiðslur til eldrasamstarvið BHS kr. 8.550.000,00 og afturgjald av skuld kr. 3.500.000,00.
Inntøkurnar eru mettar til kr. 31.950.000,00, harav inntøkan frá eftirlønargjøldum, DIS og FAS er kr. 8.550.000,00 sambært meting frá FMR.
**Fíggjarnevndin 18.10.2021:**
Nevndin mælir til, at skattaprosentið verður óbroytt 20,75% og barnafrádrátturin verður óbroyttur kr. 6.500,00.
<u>**Avgerð**</u>**:**
Einmælt samtykt.

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 20.00

Janus Thomsen Ronni Hammer Eir J. Norðberg Niels Olaf Eyvindsson

Gunnhild Mortensen Thorstein Thomsen Martin í Nesi